# Fróði gull í lopi

*3. juli 2009 ak*



Fróði Mortensen hevur í dag í bundni kappingini, á Oyggjaleikunum, vunnið gull í lopi.

Rósing hevur hevur vunnið 2 silvur, og er tað á gólvinum og í paralellari barru. Og Rósing hevur vunnið bronsu í ringunum.

Tillukku tillukku

GO FIMLEIKUR

ak

# Ferðafrasøgn frá Finnlandstúrinum

***10. November 2009 Katrin Abrahamsen og Joan Petersen***

Á hesum túri skuldu kvinnurnar vera við í kappingini AGG World Cup Final. Haraftrat skuldu kvinnu - og unglingaliðini á venjingarlegu, har tær eisini skuldu læra sínar seriur til næsta kappingarár.




**7. okt.** kl. 15.15. varð farið av farstøðini. Vit flugu úr Vágunum kl. 17.30 og lendu í Kastrup kl 20.45 lokala tíð. Tóku síðan tokið til Kbh. Hovedbanegård og gingu harfrá yvir til Danhostel har vit yvirnáttaðu. Flest allar fóru í bað sama kvøld og síðan í song, við tað at vit skuldu upp tíðliga næsta morgun.

**8. okt.** gekk ferðin til Finnlands. Vit lendu í Finnlandi kl 12.10. Har vórðu vit móttiknar av foreldrum at smágentu fimleikarum, ið hjálptu til í hesum sambandi. Tey koyrdu okkum til Sokos Hotel Tapiola Garden í Espoo, ið liggur beint uttanfyri Helsinki. Við tað at vit ikki sluppu inn í kømurini fyrr enn kl. 14.00, fóru vit fyrst at eta. Síðan fingu vit nógv um at verða, tí gólvið skuldi roynast stutt aftaná, og vit skuldu bæði finna buss og høll. Men tað gekk fínt, hóast vit máttu klatra upp um eitt stórt hegn, um ikki vit vildu ganga ein langan umveg.

**9. okt.** var dagurin tá kappingin skuldi fara fram í Barona Arena. Okkurt var, sum skuldi fáast uppá pláss í seriuni, so kvinnurnar vandu frá tíðliga á morgni. Unglingarnir, sum fyrstu dagarnar høvdu til uppgávu at vera áskoðarar, hugnaðu sær í venjingar hølunum á hotellinum. So var farið yvir til Barona Arena, har vit fyrst fingu frokost. Eftir hetta vandu kvinnurnar

gólv og fóru síðan at gera seg klárar til World Cup kappingina. Sigast kann, at tær vóru sera seriøsar og uppsettar til hesa kapping, og sjálvandi sást eisini eitt sindur av nervøsiteti. Unglingarnir komu eisini yvir í venjingar hølini, so tær kundu síggja hvussu lið, sum Russiska Oskar og Finska Deltat og onnur útlendsk lið venja og gera seg klár, áðrenn tey skulu inn á gólvið, og var hettar sera mennandi fyri tær. Eftir hettar vóru tær áskoðarar og dugdu tær sera væl at heppa á liðið hjá Havnar Fimleikafelag.
Kvinnurnar vóru sera nøgdar eftir at hava verið á gólvinum. Við einum tekniskum karakteri á heili 4,16 kann man ikki siga annað enn, at tær hava tikið seg sera nógv fram tekninskt. Vit hava ongantíð fingið ein so høgan tekniskan karakter samanborðið við onnur útlendsk liðini. Eisini listarligi karakterurin var sera góður.

Til samanberingar kunnu vit taka:
Nr 8. Estlendska Piruett Tekn. 4,30 List. 2,53 Framf. 7,20 Samanlagt: 14,03
Nr 9 Havnar Fimleikafelag Tekn. 4,16 List. 2,43 Framf. 6,35 Samanlagt: 12,94
Nr10 Spanska Dreams Tekn. 2,56 List. 1,90 Framf. 6,30 Samanlagt: 10,76

Av hesum síggja vit, at okkara kvinnur vóru so gott sum á sama støði tekniskt og listarligt sum Estlendska Piruett, meðan okkara framførsla var eitt vet verri, darvað av nervum og kanska manglandi royndum.
Vit hoyrdu aftaná, at dómararnir vóru á einum málið um, at okkara kvinnur vóru absolut bestar til at vísa útrykk og at vísa at fimleikur eisini kann vísast innanífrá og ikki bert við rørslum. Frá fleiri dómarum fingu vit at vita, at teir vóru imponeraðir at síggja, hvussu nógv kvinnurnar høvdu ment seg. Og russiska Sanyia, sum hevði gjørt seriuna hjá kvinnunum, var sera væl nøgd. Serliga var kanoin í seriuni góð, við tað at hon gav eina góða effekt. Tað varð eisini klappað serliga nógv í hesum pettinum í seriuni. Finska Liisa segði okkum seinni, at har kundu hennara gentur læra nakað.
Við tað at HF endaðu á einum 9. plássi og bert 8 lið sluppu víðari, roknaðu vit ikki við at vera komin víðari og fóru heim í góðum lag at fáa okkum ein betri bita. Hettar endaði tó við eini grill barr, tí vit komu so seint heim, at alt var stongt. Hóast hettar var hýrurin góður bæði á kvinnum og unglingum og eftir at hava verið í bað, settu kvinnurnar seg í lobbyina at hyggja at filmklippum frá degnum og lurta eftir tónleikinum til nýggju seriuna, sum tær skuldu fáa frá Russisku Sanyiu tveir dagar seinni. Tær sótu uppi eitt sindur leingi, tí dagin eftir skuldu tær bert hugna sær og vera áskoðarar til finaluna.

**10. okt.** Hóast kvinnurnar vóru farnar seint í song, vóru tær tíðliga á fótum næsta morgun, tí ein lítil glotti var, har tær kundu hugna sær saman í býnum. Knappliga verða kvinnurnar uppringdar, um at tær vóru komnar við í finaluna, tí 2 lond høvdu 3 luttakandi lið við og bert 2 frá hvørjum landi komu víðari. Beinta Danielsen hevði tilvildarligt sæð hetta á einum lista við elevatorin á hotellinum. Sigast skal í hesum sambandi, at finnar bert siga úrslit á enskum, alt annað verður sagt á finskum, so ringt er at fylgja við um man ikki skilir finskt. Tí høvdu hvørki føroyski dómarin, ferðaleiðarar ella Katrin FFS lagt hettar til merkis. Nú var eitt hjá kvinnunum at gera, og tað var at sleppa tað, tær høvdu í hondunum og drøna yvir til hotellið at gera seg klárar til finaluna.
Eftir sum hettar kom eitt sindur óvart á tær, vóru tær ikki líka nervøsar sum dagin fyri og sást hettar eisini aftur í framførðslu karakterinum, sum lág hægri. Tann tekniski karakterurin var lægri, men var hettar nokk ikki at undrast yvir, tá ein hevur í huga, at tær høvdu sovið alt ov

lítið og vóru tí rættiliga troyttar.
Til finaluna endaðu kvinnurnar hjá HF á 7. plássi við einum samanløgdum karakteri á 25,82. Spanska Dreams endaði á einum 8. plássi við karakterinum 22,15.
Kvinnurnar hingu eitt sindur við nevinum, tí tær vóru skuffaðar yvir tað tekniska avrikið, men so letur í einum teirra: „ Nei, nú mugu vit vera í góðum lag, vit fáa nýggju seriuna í morgin". „ Yes søgdu so hinar", og tær vóru aftur í góðum lag. Men tað, sum tær ikki vistu var, at Sanyia var farin aftur til Russlands, orsakað av deyðsfalli í familjuni. Hetta máttu tær so hava at vita so ella so. Tær vóru bidnar um at vera positivar og hugsa positivt, áðrenn tær fingu hesi keðiligu boð. Sigast má at tað var ótrúligt at síggja, hvussu tær stóðu saman um, at okkurt gott nokk skuldi fáast burtur úr hesum túri hóast hesi keðiligu boð.
Á veg yvir til hotellið møttu vit Liisu, venjaran hjá unglingum og fyriskiðari av allari kappingini, og hon fekk ta uppgávu at royna at finna onkran venjara til kvinnurnar komandi dagarnar. Hon lovaði at gera tað, hon kundi. Galla framsýning var seinni um kvøldið, og var hetta sera vakurt at síggja, hóast vit ikki skiltu nógv av tí, ið sagt varð orsakað av, at alt var á finskum.

**11. okt.** byrjar venjingarlegan. Unglingarnir, sum hava verið áskoðarar í 2-3 dagar, eru sera spentar at sleppa at venja. Liisa er sera hjálpsom og vinarlig og tekur sær pent av bæði kvinnum og unglingum hendan dag. Tær vandu saman í Tapiola Hall frá kl. 12-16, og vóru bæði kvinnur og unglingar sera væl nøgdar, tá dagurin var av.
Frá 18-20 vandu tær í Langstad Skolan. Her byrjaðu unglingarnir so smátt uppá teirra seriu.

**12. okt.** fóru vit fyrst við bussi yvir í Kannusilta Hall, har tær vandu har frá kl 13-15:30. Bussførarin skilti einki enskt, og máttu vit tí ordiliga spenna okkum út við bæði at tekna tok og siga fut fut, fyri at hann skuldi skilja, at vit skuldu av við tokstatiónina. Í Kannusilta Hall helt Liisa venjari hjá unglingunum fram við at læra unglingar teirra seriu, meðan ein annar venjari var til kvinnuliðið. Kl 19:30-22 vandu tær í Tapiola Hall saman við Ampeerit, og kláraðu tær seg heilt væl. Venjari var eisini til bæði kvinnur og unglingar.

**13. okt.** skuldu tær fyrst venja tvær ferð í Tapiola Hall (9-10:30 og 13-14:30). Liisa hevði upphiting, lop o.a. saman við teimum. Um kvøldið fóru bæði liðini at vitja Club Pakila og venja saman við teimum. Vit vóru har frá kl. 18-20:30 og fingu nógv burturúr. Aftur her møttu vit fyrikomandi og fittum fólkum.

**14. okt.** vandu unglingar og kvinnur í Tapiola Hall frá 11-14:30. Tær høvdu hvør sín venjara. Seinni vandu tær í Omnia Skolan frá kl. 16-19. Eisini her høvdu tær hvør sín venjara. Unglingarnir framførdu alla seriuna fyri okkum øllum. Tær hava pressað á fyri at læra seg alla seriuna, meðan tær eru í Finlandi.
Hetta seinasta kvøldið ótu vit á McDonald og sandwich frá SubWay (Sunset) eisini fingu vit ís omaná og smakkaði hettar sera væl. :)

**11-14 okt.** Niðurstøðan av hesum døgum er avgjørt tann, at bæði unglingar og kvinnur hava lært sera nógv. Tær hava lært eina heilt øðrvísi upphiting enn tær eru vanar við. Ístaðin fyri at gera eitt øvilsi 100 ferð, lærdu tær her at gera fleiri ymisk øvilsir færri ferð, so hetta bleiv minni trivielt. Og føldu tær aftaná venjingarnar, at allir vøddar í kroppinum vóru nýttir. Kvinnurnar lærdu sera nógv av teirra eyka venjarum, sum komu til hjálpar. Nevnast kann her

at gera ymiskar javnvágir rætt og fleiri ymiskir teknikkir viðvíkjandi piruettu, og lopum.

**15. okt.** var dagurin, vit skuldu venda nøsina heimaftur. Vit fóru tíðliga upp hendan morgunin, kl. 2 um náttina føroyska tíð. Vit vórðu avheintaðar kl. 5 av einum bussi. Síðani fóru vit við flogfari til Danmarkar/Kastrup. Har bíðaðu vit í 4 tímar, áðrenn leiðin gekk heim aftur á klettarnar við Atlantic Airways. Hereftur við bussi til Havnar, har Guðrun og foreldur vóru og tóku í móti okkum.
Sigast kann at hettar hevur verið ein sera góður og lærurikur túrur, sum vit fara at minnast aftur á við gleði. :)

Vinaliga

Katrin Jacobsen, ferðaleiðari hjá unglingunum
&
Joan Petersen, ferðaleiðari hjá kvinnum.

# FM fyri lið í amboðsfimleiki 1. dagur

***31. oktober 2009 Haldur Suni***

Í dag, leygardagin 31. oktober, hava pinkur, gentur, kvinnuunglingar og kvinnur kappast um FM-heitið í fimleiki fyri lið.

Stóri vinnarin gjørdist Støkk, sum vann kappingina hjá kvinnum, kvinnuunglingum og pinkum. Ljósið vann gentudeildina.

Tó var tað ikki verri enn so hjá okkum HF'arum at vit vunnu silvur í kvinnu, gentu og pinkudeildini!

Vit ynskja vinnarunum til lukku!

Úrslitini vóru hesi:

**BÓLKUR IV - KVINNUR**

| HF | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Birita Dal-Christiansen | 8,500 | 0,000 | 11,350 | 0,000 | **19,850** |
| Herdis Thomsen | 5,550 | 8,400 | 11,400 | 0,200 | **25,550** |
| Andrea Appel | 0,000 | 7,700 | 11,500 | 6,600 | **25,800** |
| Katrin S. Wardum | 10,550 | 9,600 | 12,550 | 8,600 | **41,300** |
| Eiriksfoss | 8,500 | 0,000 | 0,000 | 1,400 | **9,900** |
| **Samanlagt** | **27,550** | **25,700** | **35,450** | **16,600** | **105,300** |

| Støkk | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríðhild R. Norðgerð | 9,550 | 9,650 | 11,800 | 2,000 | **33,000** |
| Silja Højgaard | 10,050 | 10,050 | 12,150 | 2,700 | **34,950** |
| Kristina Toftegaard | 11,200 | 10,800 | 12,350 | 8,900 | **43,250** |
| Anita Davidsen | 8,550 | 9,550 | 11,950 | 4,600 | **34,650** |
| **Samanlagt** | **30,800** | **30,500** | **36,450** | **16,200** | **113,950** |

## BÓLKUR III - KVINNUUNGLIGAR

| Støkk | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Annika B. Hansen | 9,000 | 0,000 | 11,000 | 0,000 | **20,000** |
| Linda Maria Hansen | 4,200 | 8,400 | 11,550 | 1,600 | **25,750** |
| Birita Debes | 8,950 | 9,050 | 11,600 | 2,200 | **31,800** |
| Durita Davidsen | 8,800 | 9,150 | 11,900 | 2,200 | **32,050** |
| **Samanlagt** | **26,750** | **26,600** | **35,050** | **6,000** | **94,400** |

## BÓLKUR II - GENTUR

| Ljósið | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Marianna Eystberg | 17,000 | 18,650 | 13,325 | 14,800 | **63,775** |
| Jóna Holm | 16,450 | 16,700 | 0,000 | 15,000 | **48,150** |
| Eyðvør Samuelsen | 13,800 | 16,650 | 10,925 | 14,400 | **55,775** |
| Maria Jacobsen | 0,000 | | 10,600 | 13,900 | **24,500** |
| Bjørt Olafsdóttir | 14,100 | 13,650 | 10,575 | 0,000 | **38,325** |
| **Samanlagt** | **47,550** | **52,000** | **34,850** | **44,200** | **178,600** |

| HF | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Súsanna A. Bláhamar | 12,750 | 16,350 | 12,675 | 0,000 | **41,775** |
| Bjarta Jansdóttir | 0,000 | 0,000 | 12,750 | 14,400 | **27,150** |
| Gunn H. Persson | 15,400 | 14,050 | 12,725 | 14,500 | **56,675** |
| Heidi Bendtsen | 16,800 | 13,900 | 0,000 | 14,550 | **45,250** |
| Bjørt H. Joensen | 14,450 | 16,600 | 12,850 | 13,300 | **57,200** |
| **Samanlagt** | **46,650** | **47,000** | **38,325** | **43,450** | **175,425** |

| Støkk | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Mary Frederiksberg | 11,200 | 11,300 | 8,325 | 11,000 | **41,825** |
| Elisabet Absalonsen | 13,150 | 13,350 | 8,800 | 14,550 | **49,850** |
| Sára Dahl | 11,800 | 11,450 | 8,125 | 14,300 | **45,675** |
| **Samanlagt** | **36,150** | **36,100** | **25,250** | **39,850** | **137,350** |

## BÓLKUR I - PINKUR

| Ljósið | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Íðunn Rúnadóttir | 10,250 | 7,750 | 7,850 | 13,900 | **39,750** |
| Súna Rein | 0,000 | 9,750 | 0,000 | 13,800 | **23,550** |
| Marita Mortensen | 10,200 | 12,500 | 8,200 | 14,100 | **45,000** |
| Christina Arge | 0,000 | 9,650 | 8,475 | 14,800 | **32,925** |
| Guðrun Tórsdóttir | 8,000 | 0,000 | 7,625 | 0,000 | **15,625** |
| **Samanlagt** | **28,450** | **31,900** | **24,525** | **42,800** | **127,675** |

| HF | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Anja P. Petersen | 12,900 | 14,000 | 9,150 | 12,300 | **48,350** |
| Jóhanna Ørvarodd | 0,000 | 10,400 | 8,950 | 0,000 | **19,350** |
| Fía H. Smith | 13,250 | 9,800 | 8,925 | 13,100 | **45,075** |
| Kaspara Danielsen | 10,700 | 0,000 | 0,000 | 11,600 | **22,300** |
| Rebekka H. Joensen | 10,650 | 10,200 | 8,575 | 11,000 | **40,425** |
| **Samanlagt** | **36,850** | **34,600** | **27,025** | **37,000** | **135,475** |

| Støkk | Biti | Gólv | Lop | Forsk. barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Marjun Jacobsen | 11,800 | 0,000 | 8,700 | 12,100 | **32,600** |
| Marta Nielsen | | 13,800 | 8,825 | 14,850 | **37,475** |
| Kaia R. Norðgerð | 11,900 | 11,550 | 0,000 | 14,200 | **37,650** |
| Ása S. Carlsen | 12,250 | 14,150 | 8,575 | 14,650 | **49,625** |
| Bjørt Davidsen | 14,150 | 13,600 | 8,675 | 0,000 | **36,425** |
| **Samanlagt** | **38,300** | **41,550** | **26,200** | **43,700** | **149,750** |

# FM fyri lið í amboðsfimleiki 2. dagur

***1. november 2009 Haldur Suni***

Í dag, sunnudagin 1. november, hava piltar, dreingir, mansunglingar og menn kappast um FM-heitið í fimleiki fyri lið.

Í piltadeildini vann HF í kapping við Ljósið, og í hinum deildunum var HF einasta liðið ið luttók. Tvs. 4 føroyameistaraheiti til HF í dag.

Vit ynskja vinnarunum til lukku!

Úrslitini vóru hesi:

**BÓLKUR IV - MENN**

| HF | Lop | Gólv | Ringar | Paralell barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Rósing Dam | 12,700 | 12,100 | 12,300 | 12,300 | **49,400** |
| Øssur Debes Eiriksfoss | 12,550 | 12,300 | 11,900 | 11,300 | **48,050** |
| Olivur Debes Eiriksfoss | 12,650 | 10,900 | 0,000 | 1,700 | **25,250** |
| Bogi Berg | 11,900 | 11,400 | 5,100 | 0,000 | **28,400** |
| Ari Sakarisson | 0,000 | 0,000 | 6,600 | 2,200 | **8,800** |
| **Samanlagt** | **37,900** | **35,800** | **30,800** | **25,800** | **130,300** |

**BÓLKUR III - MANSUNGLINGAR**

| HF | Lop | Gólv | Ringar | Paralell barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Sofus Andreassen | 11,600 | 9,900 | 1,600 | 0,000 | **23,100** |
| Johan Petersen | 11,650 | 11,200 | 1,500 | 0,000 | **24,350** |
| Tór av Skarði | 12,000 | 10,600 | 1,300 | 0,000 | **23,900** |
| **Samanlagt** | **35,250** | **31,700** | **4,400** | **0,000** | **71,350** |

## BÓLKUR II - DREINGIR

| HF | Lop | Gólv | Ringar | Paralell barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Bartal Wardum | 6,550 | 3,700 | 2,600 | 2,300 | **15,150** |
| Aron Jacobsen | 5,900 | 4,000 | 3,000 | 2,200 | **15,100** |
| Heini Mohr Samson | 5,450 | 1,350 | 2,300 | 2,200 | **11,300** |
| Tóri Atlason | 5,650 | 4,200 | 3,400 | 2,300 | **15,550** |
| Rani Petersen | 6,450 | 5,700 | 3,300 | 2,400 | **17,850** |
| **Samanlagt** | **18,900** | **13,900** | **9,700** | **7,000** | **49,500** |

## BÓLKUR I - PILTAR

| Ljósið | Lop | Gólv | Ringar | Paralell barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Leivur Mortensen | 6,000 | 3,300 | 2,700 | 2,200 | **14,200** |
| Trygve Willemose | 4,450 | 3,700 | 0,800 | 2,300 | **11,250** |
| Rasmus Krosstein | 4,700 | 0,000 | 1,000 | 2,100 | **7,800** |
| Ragnar Samuelsen | 0,000 | 1,000 | 0,000 | 1,800 | **2,800** |
| Ingi Arge | 4,550 | 1,200 | 0,000 | 1,700 | **7,450** |
| **Samanlagt** | **15,250** | **8,200** | **4,500** | **6,600** | **34,550** |

| HF | Lop | Gólv | Ringar | Paralell barra | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| Jákup Jørgensen | 5,950 | 4,500 | 3,400 | 2,400 | **16,250** |
| Hannes Agnarsson | 5,900 | 4,800 | 3,200 | 2,600 | **16,500** |
| Christopher K. Eikhólm | 5,950 | 4,000 | 2,600 | 2,200 | |
| Djóni Sakarisson | 6,150 | 3,200 | 2,600 | 2,200 | **14,150** |
| Rani Dalsgarð | 5,800 | 3,800 | 3,200 | 2,700 | **15,500** |
| **Samanlagt** | **18,050** | **13,300** | **9,800** | **7,700** | **48,850** |

# Fimleikahøllin Fimi er reist

***10. oktober 2009***



Í dag var reisigildi í nýggju fimleikahøllini Fimi, sum er í Gundadali millum Tórsvøll og Svimjihøllina. Fimleikahøllin verður liðug til várs.

Umframt Maud Hilduberg prosjektleiðara fyri MT Højgaard og Jákup Egholm Hansen formann í bygginevndini, helt Heðin Mortensen borgarstjóri røðu. Her er røðan hjá borgarstjóranum:

Vælkomin øll!

Vit eru í dag – sum siður er – komin saman at halda reisigildi, nú fimleikahøllirnar her í Gundadali eru reistar.

Saman kunnu vit nú øll skoða handverkið og úrslitið, bæði arbeiðsfólk, byggiharri – í hesum føri kommunan – og øll onnur, ið eru knýtt at byggingini.

At fimleikurin nú eisini fær eitt heim í Gundadali, er ikki annað enn náttúrligt, tí her hevur ítrótturin hildið til undir góðum og skipaðum umstøðum í skjótt fleiri mannaminni.

Við hesum bygningi, sum vit í dag reisa, hava vit sett okkum fyri at skapa enn betri karmar um ítróttin.

Vanligt er at síggja ryggásina skjóta seg upp úr bygninginum, tá vit halda reisigildi, men so er ikki í dag, tí bygningurin er flatur.

Bert tvey fløgg veittra og bera boð um eina hugsaða ryggás, sum vit í dag savnast undir, tí hetta er ein serlig konstruktión, ið er so gjørd so mikið sterk, at hon kann bera heilar tvær hæddir oman á bygning, ið nú er reistur.

Sermerkt er eisini, at á skráanum oman móti Tórsvølli er rúm fyri fýra røðum, har áskoðarar

kunnu sita, tá dystir eru á Tórsvølli – bæði landsdystir, europeiskir og aðrir dystir.

Men tað er ikki bara uttan, at bygningurin gevur fleiri møguleikar, tí eisini innan ber til at brúka høllirnar bæði hvør sær og saman, við faldiveggi ímillum.

Tann størsta høllin í miðjuni verður til amboðsfimleik, meðan hinar báðar smærru verða til rútmiskan fimleik, men tær kunnu eisini allar tríggjar leggjast saman til eina stóra høll.

Mál okkara er, at hetta verður ein høll fyri øll í Tórshavnar kommunu, og eins og Svimjihøllin beint omanfyri verður hon tøk hjá skúlum í skúlatíð.

Og aftan á skúlatíð verða tað so tey bæði fimleikafeløgini í býnum, Havnar Fimleikafelag og Ljósið, ið koma at leiga seg inn í høllina.

Hetta er ein stór íløga hjá Tórshavnar kommunu, og sum borgarstjóri vóni og veit eg, at hon ikki fer at standa tóm, men at slit fer at síggjast aftur, tá hon letur upp til várs.

Kjarnin í einum reisigildi er, at vit í felag hyggja bæði fram og aftur, og hesa løtu kunnu vit meta um støðuna, sum hon tekur seg út í lendinum.

Havnar Fimleikafelag er javngamalt við Tórshavnar kommunu, og fólksliga ræðið hevur gingið hond í hond við fólksligu íðkanina hesa farnu øldina.

Við navninum á hesum bygningi seta vit krúnuna á verkið og staðfesta, at enn sum áður er galdandi meginreglan um eina sunna sál í einum sunnum likami.

Hyggja vit 100 ár aftur í tíðina, vóru tað bara mannfólk, ið íðkaðu skipaðan ítrótt, og tað gjørdu teir tá undir navninum Fimur, sum var fyrsta ítróttarfelag í Havn, stovnað í 1901.

Við støði í hesum elsta ítróttanavninum og tí, sum hendi í kommununi annars, tá kvinnur fingu valrætt, hava vit tikið hetta navn fram av nýggjum.

Tó hava vit bent tað eitt sindur, so bygningurin, tá hann letur upp til várs, fer at bera tað fakliga lýsandi og meiri innbjóðandi heitið: Fimi.

Nú vit í dag kunnu síggja, hvussu væl hetta arbeiði og henda bygging er komin áleiðis, er hetta helst eisini løtan at nevna nøkur tøl og nakrar samanberingar.

Fimleikahøllin á Stórheyggi, sum varð tikin í brúk fyri 35 árum síðani, í 1974, kostaði samanlagt 3,3 milliónir krónur.

Samlaði kostnaðurin fyri høllina Fimi er 59 milliónir krónur, men tá eru bæði innbúgv og hornabygningurin til Tórsvøll, niðan ímóti Svimjihøllini, eisini tald við.

Spírin til verkætlanina hómaðist í 2005, men ikki fyrr enn 19. juni í fjør samtykti býráðið at fara undir at byggja Fimi, og spakin var settur í tann 3. november.

Ingibjørg Berg hevur verið formaður í bygginevndini, til hon gjørdist kommunustjóri fyri kortum, og síðani hevur Jákup Egholm Hansen verið formaður.

Hinir limirnir í bygginevndini fyri Fimi eru Jákup Simonsen, Heri Olsen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

Maud Hilduberg er prosjektleiðari fyri MT Højgaard, og Jakob Sandgrav og Regin Poulsen eru entreprisuleiðarar.

Fyri Tórshavnar kommunu hevur Hans Suni Eiriksfoss havt prosjektábyrgdina fyri Fimi.

Sum borgarstjóri takki eg tykkum fyri, at komið er so mikið ávegis, at vit nú kunnu halda reisigildi.

Og síðst – men ikki minst – vil eg fegin takka øllum tykkum, sum dúgliga og trúliga hava arbeitt her og gjørt tykkara til, at vit eru komin so langt ávegis við Fimi.

Vit gleða okkum til várs, tá arbeiðið verður liðugt, og higartil kunnu vit ikki siga annað, enn at tað sær bæði lovandi og gott út.

Her er høgt til loft og vítt til veggja. Her eru framtíðar karmar til fimleikin á høgum støði. Vit í Tórshavnar kommunu kunnu verða stolt og tað eru vit eisini.

Takk fyri, øll somul!

Heðin Mortensen
borgarstjóri

# Ungdómskvøldið - HF 100 ár

***16. November 2009***

Í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá Havnar Fimleikafelag verður skipað fyri ymiskum tiltøkum. Eitt av hesum tiltøkum er eitt ungdómskvøld, har nógvir fimleikarir møtast og deila felags áhugamál og hava tað hugnaligt saman. Ungdómskvøldið verður 16. Nov og byrjar kl.19.00. Stað verður upplýst seinni. Skráin hetta kvøldið er hendan:

Filmklipp: Filmklipp vera at síggja á stórskíggja av fimleikarum.

Kapping: Fyri at gera hetta kvøldið “hugaligari/stuttligari” verður skipað fyri eini filmkapping har temaið skal knýta seg at 100 ára føðingardegnum hjá HF - her hava vit valt evnið fimleikur fyrr og nú.
(Tey, ið hava hug at laka lut í hesi kapping, skulu gera ein film kláran til hetta kvøldið. Filmarnir skulu latast inn í seinasta lagi leygardagin 14 nov. Kl.17.00. í Lynggøtu 6. Evt. kunnu tey, ið hava hug at taka lut, bólka seg í smáar bólkar max. 5 í hvørjum.)

Bólkurin, ið vinnur filmkappingina, ognar sær eitt gávukort frá Carello og ein bana á 1 tíma í Bowlingahøllini á Hálsi.

Fyri at hugna eitt sindur um hetta kvøldið verður tónleikur til ungdóm at hoyra alt kvøldið. Eisini verður okkurt leskiligt at keypa í Caféini alt kvøldið.

Hava tit spurningar um eitthvørt, eru tit vælkomin at venda tykkum til okkara.
Durita tlf. 593696, Brynhild tlf. 262162, Jeanni tlf. 506936 og Rósing tlf. 261462

Vinarliga vegna ungdómsdeildina J

# Fimleikur í Vestmanna góða móttøku

***1. september 2009 Haldur Suni***

Deildin hjá Havnar Fimleikafelag í Vestmanna hevur fingið stak góða móttøku. Av teimum 81 børnunum, sum ganga í 1. til 5. flokki í Vestmanna skúla, hava 72 teknað seg at ganga til fimleik í vetur - harav eru fýra úr Kvívík. Og tilmeldingarnar koma allatíðina, so hvør veit, kanska fær man eina 100% luttøku!

Bygdaráðið er jaligt um samstarvið við Havnar fimleikafelag, og annars skal sigast at reaktiónirnar í bygdini eru av tí góða. Alt frá at "hetta manglaði í bygdini", "burdi langt síðani verið komið" og til at "høvdu vit bara havt hendan møguleikan tá ið vit vóru ung".

Sagt verður úr Vestmanna, at nýggj tímatalva er ávegis. Hetta kemur av, at so nógv teknaðu seg til tað eina reiðskapsliðið, at tað má deilast sundur í tvey. Har er bara tann vanliga fimleikahøllin, sum hoyrir til skúlan, og mark er fyri hvussu nógvir fimleikarar kunnu verða har í senn.

# Høllin við Tórsvøll kallað Fimi

***26. september 20009 ak***




25. sept. stóð soleiðis at lesa á heimasíðuni hjá Tórshavnar býráð:

Fimi í Gundadali
Á fundi í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs er samtykt, at nýggja fimleikahøllin við norðara enda á Tórsvølli verður kallað Fimi.
Grundgevingin er, at Fimi er eitt stutt og snøgt navn, sum boðar frá leikum, ið geva megi, og ikki minst gevur boð um, hvat bygningurin er ætlaður til.
Dømi um málbrúk: Eg fari í Fimi. Eg fari oman í Fimi. Fimi í Gundadali.
Vit síggjast í Fimi í Gundadali á vári 2010.

# HF í finaluna í World Cup

***10. oktober 2009 Guðrun/Haldur Suni***

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur eitt føroyskt fimleikafelag kvalifiserað seg til finaluna í einari heimsmeistarakapping!

Í gjár, fríggjadagin tann 9. okt., var innleiðandi kappingin í World Cup finaluni, í estetiskum fimleiki, í Finnlandi, og kvalifiseraðu kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag seg til finaluna, sum verður í dag!

Úrslitið av innleiðandi kappingini gjørdist:

1. Deltat (FI) 18,38
2. Oscar (Russia) 18,28
3. Madonna (Russia) 17,81
4. Ampeerit (FI) 17,16
5. Tiklit (FI) 16,16
6. Expressia (Russia) 15,44
7. Freyat (FI) 15,26
8. Piruett (EST) 14,03
9. HF (FØ) 12,94
10. Dreams (Spania) 10,76

Piruett fingu 4,3 í tekniskum, 2,50 í listarligum og 7,20 í framførslu.
HF fingu 4,16 í tekniskum, 2,43 í listarligum og 6,35 í framførslu.
Dreams fekk 2,5 í tekniskum, 1,90 í listarligum og 6,30 í framførslu.

Av tí at talan er um steypakapping eru reglurnar soleiðis, at átta tey bestu koma í finaluna, tó bert tvey úr hvørjum landi, og soleiðis er HF komið í finaluna!

Sunnudagin byrja kvinnuunglingarnir og kvinnurnar at venja seriur.

Afturmeldingarnar til føroysku kvinnurnar eru at tær hava tikið seg sera nógv fram tekniskt.

Kvinnurnar eru væl nøgdar við avrikið og eru sera glaðar fyri tekniska karakterin, sum er væl betri enn hann plagar í mun til hini liðini.

# Fimleikur í fokus

Framløga hjá FFS leygardagin 14. november 2009
Müllers pakkhus

Framtíðarætlanir við fimleikinum/hvønn veg fara vit?

Eg eri biðin um at umrøða framtíðarætlanirnar hjá Fimleikasambandinum – hvønn veg fara vit. Hvat satsa vit uppá: elitu ella breidd – rútmu ella amboðsfimleik.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at vit satsa upp á rútmu og amboð – elitu og breidd.

Taka vit elitu og breidd fyrst, so verður vanligani í fimleikahøpi sagt, at tey, sum kappast í fimleiki, eru elitan (óansæð støði og aldur), og tey, ið ikki kappast, eru breiddin.

Sersambondini í ÍSF taka sær í høvuðsheitum av kappingum – heimligum og altjóða kappingum – og annars tað, sum krevst til at menna kappingarnar og landsliðini.

Sum sersamband er FFS í tí serligu støðu, í mun til onnur sersambond, at stórsti parturin av limunum í feløgunum ikki kappast. Tað eru færri enn 10% av limunum í feløgunum, sum luttaka í kapping, ímeðan restin íðkar fimleik av áhuga.

Samanbera vit okkum við aðrar ítróttargreinar, kunnu vit siga, at har kappast so at siga øll, og tað, sum vit kanska kunnu kalla 1. lið ella besta deildin, er 10 % av fjøldini. Sostatt er teirra elita eisini 10% og restin kann kanska kallast "breidd" – í øllum førum grundin undir elituni. Uttan øll tey yngru liðini var eingin elita, og í fimleikinum var eingin elita uttan breiddina.

Estetiskur fimleikur

Tann fimleikurin, sum hevur verið serliga sjónligur seinastu árini, er tann estetiski fimleikurin.

FFS valdi fyri nøkrum árum síðani at fara frá stórkappingini, sum kappast hevði verið eftir í gott 20 ár. Stórkappingin var eitt stórt framstig, tá hon kom, men tíðin var farin frá hesi kapping, ið er ein serlig donsk kapping, har bert danir luttaka, og so føroyingar eisini, sum gestalið. Vit høvdu yvirhálað danskarar, og okkara støðið var væl hægri enn teirra støði. Vit vildu hava eina kapping, sum førdi okkum víðari út í heim.

Tá vit gjørdust kunnug um estetisku kappingarnar, kannaði FFS saman við fimleika¬feløgnum, um hetta var ein kappingin fyri okkum. Tað vísti seg at vera eitt slag av fimleiki, sum hóskaði væl vil okkara fimleikarar, og støðið á teimum liðunum, sum lógu í niðara endanum var til at til røkka í nærmastu framtíð. Hetta var fimleikur fyri eygað, og nakað, ið áskoðarar fóru at taka til sín.

Tað hevur eisini víst seg, at valið var tað rætta. Støðið á heimligu kappingunum er hækkað nógv, og úrslitini í altjóða kappingum eru góð. Føroysku liðini taka seg nakað meiri fram, enn

tey liðini, ið hava tikið estetiska fimleikin til sín um somu tíð sum vit.

FFS fer at halda fram við estetisku kappingunum eftir sama leisti, tó kunnu smærri tillagingar verða gjørdar á hvørjum ári.

Í 2011 ætla vit at skipa fyri einari altjóða kapping í Føroyum. IFAGG (International Federation of Aestetic Group Gymnastic) hevur heitt á okkum at skipa fyri eini altjóða kapping fyri unglingar. Um talan verður um ein Cup-kapping ella HM er støða ikki tikin til enn.

Ynskir eru frammi um, at skipa landslið í estetiskum fimleiki. Feløgini eru ikki samd um hetta skal gerast, men FFS er so smátt farið at hugsa um, hvussu eitt landslið kann skipast, uttan tó at hava tikið endaliga støðu til, um vit skulu hava landslið í estetiskum fimleiki.

Hyggja vit at breiddini á rútmusíðuni hevur tað víst seg, at gjógvin millum tey, sum eru á úrvalsliði og á breiddarliði bara økist – serligani síðani vit tóku estetiska fimleikin til okkum. Tað er næstan hopileyst hjá einum rútmiskum fimleikara, sum ikki er tikin út til estetiskt kappingarlið á ungum árum, at koma upp í part, tá nøkur ár eru farin.
FFS ætlar sær ikki at seta abitiónsniveauið fyri fimleikararnar á breiddarliðum – tað mugu tey gera sjálvi gera, men vit vita, at nógvir fimleikarar hava brennandi ynski um at sleppa á estetiskt úrvalslið.

Tað er ikki meiningin, at allur rútmiskur fimleikur skal rættast til estetiskan fimleik. Estiskur fimleikur er ikki = rútmiskur fimleikur, men ein serlig grein á rútmusíðuni.

Feløgini mugu endiliga halda fram við øðrum rútmiskum fimleiki, t.d. hip-hop ella hvat tað kann vera. Tað eru eisini tey liðini, sum víkja mest frá tí estetiska fimleikinum, sum vit heita á at sýna fram í steðgunum, tá vit hava estetiskar kappingar.

Skulu vit framhaldandi hækka støðið á estetiska fimleikinum, má breiddin tó fylgja við. Vit mugu skipa soleiðis fyri, at venjarar á breiddarliðum verða rustaðir til at føra nakað av tí estetiska til breiddina.

FFS kann skipa fyri skeiðum fyri venjarum á breiddarliðum um estetiskan fimleik, men FFS vónar, at tað størra arbeiði hesum viðvíkjandi fara feløgini sjálvi at taka til sín.

Vit vóna at fáa fleiri lið við til kappingarnar, og at fleiri feløg fara luttaka.

## Amboðsfimleikur

Hyggja vit at amboðsfimleikinum, so eru tað størri tøk, sum skulu takast har. Har hava vit merkt ráðaloysi og mótloysi hjá feløgunum seinastu árini, men nú tað nærkast, at fyrsta amboðshøllin verður liðug, byrja vit at síggja, hvussu spent feløgini eru upp á at lyfta amboðsfimleikin.

Hóast vánaliga hølis- og venjaraumstøður, so er amboðsfimleikurin í dag á so høgum støði sum ongantíð fyrr, so okkurt gott hava feløgini gjørt.

FFS hevur í seinastuni arbeitt við at gera eitt uppskot til eina heildarloysn fyri amboðsfimleikin. Eitt sindur hava vit fingið burtur úr, men enn er langt á mál. Vit hava ikki nakra ætlan at leggja fyri feløgini enn, men vónandi verður tað komandi ár.

Vit hava umrøtt ymskar hættir at skipa amboðsfimleikin, og vit eru komin til, at vit allarhelst skulu finna ein loysn, har vit seta ein venjara, sum bæði kann venja ein landsliðshóp, og leggja bæði kappingarvenjarum og breiddarvenjarum lag á. Mál og mið verða orðað, soleiðis at feløg, fimleikarar og onnur ikki ivast í, hvørjar ætlanirnar hjá FFS eru. Vit fara at melda út, hvørjar altjóða kappingar vit fara at luttaka í upp á styttri sikt, og hvat vit ætla upp á longri sigt.
Eingin ivi skal vera í, hvat venjast skal fram ímóti, og hvat krevst fyri at koma á landsliðið.

Vit fara at vera betri til at kunna feløgini um reglugerðir, bæði altjóða og okkara egnu kappingarskipanir. Vit vita, at nevndir og ábyrgdarfólk skifta ofta í feløgunum, og fyri at hetta ikki skal órógva fimleikarnar, so má FFS til einhvørja tíð kunna stuðla feløgunum. Vit fara ikki at taka ábyrdina frá feløgunum, men heldur geva eina hjálpandi hond.

Vit ansa eisini eftir, at arbeiðið við framtíðarætlanunum ikki køvist av arbeiðsbyrðuni, sum er í dag av at skipa fyri heimligu amboðskappingunum. Til hvørja kapping í dag eru avbjóðingar, sum krevja nógva arbeiðsorku. Umframt at fáa øll amboðni upp at standa í høllini, eru dómarnir so fáir í tali, at vit fara út við luppinum, at leita til hvørja kapping. Tað hevur eydnast hvørja ferð, men vit gleða okkum til at koma inn í eina høll har øll amboðini standa uppi, og at hava so nógvar dómarar at fleiri amboð kunnu koyra í senn, og kappingarnar harvið ikki taka so langa tíð.

Nú havi eg ikki sagt eitt orð um breiddina á amboðssíðuni, men vit vænta, at tá skipaði viðurskifti verða hjá elituni í amboðsfimleikinum fer hetta at smitta av á breiddina.

Til bæði rútmu/amboðsfimleik á øllum stigum liggur í kortunum, at skipa fyri venjaraskeiðum/venjaraútbúgving. ÍSF skipar fyri grundskeiðum fyri ítróttarvenjarar, og síðani kunnu sersambondini skipa fyri viðariútbúgving við sínum serøki. Hetta hevur FFS tikið til sín og fer at skipa fyri venjaraútbúgving í fimleiki.

Ein evni afturat, sum eg eri biðinum at siga nakað um her í dag, er, um talið av fimleikafeløgum:

Hví eru so fá fimleikafeløg – hvussu fáa vit fleiri feløg? Fimleikahallir eru næstan í hvørji bygd – er tað so ringt at koma í gongd ella hvat?

Rætt er, at talið av fimleikfeløgnum ikki er stórt, men talið av íðkarum er stórt, og verandi feløgini røkka ein stóran part av landinum.

Vit hava 5 fimleikafeløg:
? Havnar fimleikafelag (1200 limir) – deild í Vestmanna
? Ljósið (800 limir)
? Støkk (700 limir)
? Flog (250 limir)
? Klaksvíkar Fimleikafelag (250 limir)

Afturat hesum er fimleikafelag í Vágunum undir stovnan og so ænir Tvøroyrar Fimleikafelag. Á Tvøroyri eru tey so smátt farin í gongd aftur og limatalið fer at nærkast 100. Vit eru ógvuliga spent upp á felagið í Vágunum, og ynskja teimum góða eydnu.

Tað eru nógv, sum droyma um at sleppa at íðka fimleik, serliga gentur, og spyrt tú eina smágentu, hví hon vil íðka fimleik, so er tað tí hon vil hava eina so fína fimleikadrakt, sum hon hevur sæð hasar penu genturnar eru í í sjónvarpinum, og so eisini eru tað rørslurnar sum tiltala.

Fimleikahallir eru nógvar av, men hesar eru ikki bert ætlaðar til fimleik. Tær eru knýttar at einum skúla, har tær dagliga verða nýttar til lærugreinina ítrótt og eisini annan ítrótt um kvøldarnar.

Samferðslukervið er so mikið gott, at tað er lætt at flyta seg til nærmasta fimleikafelag. Tað er kanska bara á Sandoynni og sunnaru helvt av Suðuroynni, at tað er serligani óhøgligt at sleppa til fimleik. – Á útoyggj vænti eg einki felag.

Karina hevur víst okkum hvussu eitt felag kann rekast, og víst á hvussu nógv krevst fyri at fáa eitt felag at koyra væl. Eg vil leggja dent á, at tað er serligani kontinutetur/at seta við, sum hevur stóran týdning.

Vit hava sæð at feløg verða stovnað, har eldsálir hava lagt alla sín orku í, at fáa felagið at koyra, men tá hesi fólkini ikki orka meiri, eru eingi at taka við og felagið dettur niður fyri.

Eg eri ikki av teirri áskoðan, at tað ræður um at hava nógv fimleikafeløg. Heldur nøkur væl koyrandi fimleikafeløg, stór sum smá. Loysnin hjá vestmenningum við at skipa seg sum eina deild hjá Havnar fimleikfelag, er kanska nakað, sum aðrar bygdir kundu hugt eftir.

Øll fimleikafeløgini mangla vaksið fólk, sum venjarar og at taka sær av øðrum uppgávum. Meginparturin av limunum eru børn, og eins og í øðrum ítróttagreinum fella nógv frá um 13-14 ára aldur. Vit hava tó hóast alt nógvar tannáringar, sum íðka fimleik, og tað ræður um at halda hesum til, og fáa tey at taka við øðrum avbjóðingum, at verða venjarar, dómarar og aðrar praktiskar uppgávur. Men skulu vit ikki gloyma, at tey eisini skulu hava loyvi til at siga nei, til at átaka sær uppgávur.

Ikki nokk við at nógv fella frá um 13-14 ára aldur, vit missa eisini nógv um um 20 ára aldur. Vit hava so fáar hægri útbúgvingar í Føroyum, og tí er tað neyðugt hjá nógvum at fara av landinum eftir miðnámsskúlaaldur, at nema sær hægri útbúging. Hetta er ein veruleiki, sum vit mugu fyrihalda okkum til og góðtaka. Avbjóðingin liggur í at halda hesum, ið fara av landinum, kunnugan við, hvat fyriferst í fimleikaheiminum í Føroyum.

Fylgja tey ikki við, er næstan hopileyst hjá teimum at koma upp í aftur á hægri stigi, tá tey koma heim aftur 5-10 ár seinni. Fimleikurin í Føroyum er livandi og broytist nógv uttan, at vit sum búgva her á landinum, leggja tað til merkis, men tey, sum hava verið burturfrá, seta ikki føran fyri at taka við sum venjarar, tí fimleikurin er so nógv broyttur/støðið er so nógv hækkað.

Viljin hjá feløgunum er so sanniliga til staðar, og við einum góðum dialogi fara vit at røkka málunum. Og málini eru høg:

• Málini hjá amboðfimleikinum fari eg ikki at avdúka í dag, men hyggja vit hvar vit standa í dag, so miða vit høgt.
• Í estetiskum fimleiki ætla vit okkum at koma í finaluna í HM 5 ár.
• Breiddin – hon fylgir við og trívist.

Valborg Joensen, forkvinna
Føroya Fimleikasamband

# Hjartabarn í 100 ár

***Røða hjá Jógvani Arge á móttøku hjá Havnar Fimleikafelag 13/11-2009.***



Tað er mær ein heiður vegna Tórshavnar Býráð at bera Havnar Fimleikafelag eina heilsan, nú felagið verður 100 ár.

Og lat meg bara leggja fyri við at ynskja felagnum til lukku við, at tað nær hendan hornasteinin, sum ikki er hvørs mans føri. Tað sigur okkum, at her hava knotur verið í felagnum, sum hevur megnað at liva undir skiftandi umstøðum í eina heila øld.

Havnar Fimleikafelag hevur øll hesi 100 árini verið eitt hjartabarn hjá havnarfólki, og tey eru mong, sum ættarlið eftir ættarlið hava røkt sín kropp og mýkt sína vøddar í felagnum.

Upp aftur fleiri eru tey, sum trúliga ár eftir ár hava møtt upp til forkunnugu framsýningarnar og kappingarnar, sum felagið hevur skipað fyri til tess at vísa, hvat er komið burtur úr um vetrarnar.

Onki er sum at eygleiða fimleikarar, kvinnur og menn, gentur og dreingir, tá tey á gólvi ella í leysari luft vísa síni kynstur.

Tað var ásannað, at fimleikur var ikki bert dagdvølja, tá hann gjørdist lærugrein í skúlanum, og tá fimleikafelag varð stovnað her í býnum.
Tað var eisini ásannað, tá hølir vórðu útvegað til fimleikin burturav. Vit kunna kalla tað serhølir, sum annars ikki vóru so vanlig tá á døgum.

Eitt tað fyrsta serhølið av slíkum slag var helst Christinesminde her omanfyri, og tá fútaskrivstovan flutti úr Leigubúðini í Tinganesi síðst í 1880unum varð hon gjørd til fimleikarhøll hjá realskúlanum.

Men hon lá mitt í øllum handilsbýlinginum úti í Havn, og handlarnir høvdu hug á húsinum. Burtur úr tí kom, at Skibsteds-handil fekk loyvi at keypa Leigubúðina, men afturfyri máttu teir byggja ein fimleikarhøll burturav.

Tann fyrsta fimleikahøllin í býnum varð bygd við Boysens garð í 1897. Hon var samstundis fyrsta ítróttabygging, sum yvirhøvur varð framd í Føroyum. So her síggja vit, hvussu centralan leiklut tykkara ítróttagrein hevði, tá skipað ítróttaríðkan av álvara tók seg upp í Føroyum.

Tann fyrsta royndin at bjóða almenninginum til fimleik mundi vera í 1895, tá Maria Jacobsen á Húsum í Havn setti eina lýsing í Føringatíðindi við yvirskriftini ”Gymnastikk fyri kvinnur” Har varð sagt, at ”fimleikur, dyrkaður upp á rættan máta, er gagnligur ikki bert fyri kroppin, men frískar eisini upp andsevnini.

Hann er besta heilsubót; setir blóðið í passaligan røring, styrkir nervurnar og viljakraftina, hjálpir til at fremja samanhald og góða semju; fyribyrgir bleiksjúku og alskyns hysteriska armóð, sum rangvørg uppfostran og livimátin nú í tíðini hava lyndi til at framala”. So mong vóru orðini í 1895, og vit kunna framvegis skriva undir upp á tey.

Nakað skjótt eftir hetta var býarins fyrsta ítróttafelag stovnað, og tá vóru menninir eisini komnir upp í part. Tað felagið æt ”Fimur”, og tað hevur rist seg í søguna við eini mynd av einum framsýningarliði, so tíðliga sum í 1901.

Um hetta mundið gekk tann spírandi áhugin fyri ítrótti í ymsar ættir. Áhugin fyri fótbólti tók eina tíð yvirhond í hesum ”Fimi” og endaði við, at HB var stovnað sum sjálvstøðugt felag í 1904, meðan áhugin fyri fimleikinum kølnaði eitt skifti. Tey áhugamálini vórðu aftur savnað í Havnar Fimleikafelag, tá tað varð stovnað 9. desember í 1909.

Siðani hevur tað gingið slag í slag. Tá eg var smádrongur lógu stór buntir av teimum fyrstu árgangunum av Ítróttatíðindum hjá ÍSF uppi á ovasta lofti hjá okkum. Eg hevði til fragd at lesa í teimum og eitt, sum eg minnist einabest er, at søgan hjá Havnar Fimleikafelag var so væl dokumenterað.

Serliga minnist eg tær mongu myndirnar av kvinnum og monnum á fimleikaliðum, sum royndu seg í nýggju og stóru fimleikahøllini, ið varð bygd omanfyri Realskúlan fyri 1920.

Har vóru myndir av stórum og snøggum hópum av havnarungdómi. Har vóru myndir av slíkum kappum sum Poul Ellingsgaard, Sofus Viðstein, Oliver Dam og Palla Nolsøe, sum vóru einafremstir millum fimleikarar í Havn. Og har sóust Vigga Cohr, Maria Arge Beier og aðrar fimleikalærindur.

Har vóru hugtakandi myndir av kvinnu- og mansliðunum, sum Havnar Fimleikafelag sendi til

Lingiaduna í Stockhólmi í 1949 og til Noregs í 1950 við Kirstin og Martin Holm á odda. Og har vóru myndir av úrmælingum sum Hera hjá Christiani Sandinginum, Palla hjá Liffu og Lítla Erlingi.

Soleiðis kundi eg hildið fram eina góða løtu, men hetta og meir aftrat fáa tit óivað alt at vita, tá bókin um Havnar Fimleikafelag kemur í ljós á sjálvum 100 ára degnum.

Eg haldi, at vit órædd kunna siga, at fimleikurin í Føroyum fylgir við tíðini. 100 ára søgan hjá Havnar Fimleikafelag er eisini søgan um, hvussu fimleikur yvirhøvur hevur ment seg hesa seinastu øldina – ikki minst innihaldsliga. Aftrat bragdarhuginum eiga nú tónleikurin og listin sín stóra lut í hesi frumítróttagrein.

Fimleikurin er ein sonn fólkaítrótt. Her er pláss fyri fólki í øllum aldri – frá tí, tú dugir at ganga, til tú ikki ert gonguførur meir. Í Havnar Fimleikafelag skilji eg, at yngstu íðkararnir eru hálvtannað ár og teir elstu er farnir upp um sjeyti.

Við sínum 1200 limum fevnir felagið ógvuliga breitt, og húsast verður í hvørjum króki, komast kann framat: undir spildurnýggjum umstøðum í Hoyvíkshaganum ella í gomlum verksmiðjum, sum eru gjørdar um til amboðsfimleik.

Breiddin íðkar av hugi og førimuni. Úrmælingarnir við lív og sál fyri at vinna. Men øll fyri at liva væl og hava tað gott.

Tórshavnar Kommuna ásannar, at fimleikurin hevur stóran týdning fyri trivnaðin. Kommunan ásannar eisini, at tann frælsi fimleikurin í býnum er eitt týðandi tilboð í so máta. Skal tilboðið eydnast til fulnar, hevur kommunan ásannað, at hon má gera sítt til at útvega tíðarhóskandi karmar.

Tí hava vit í býráðnum satt at siga ikki blunkað við at taka eitt ódnartak fólkaítróttini fimleikinum til frama við teimum trimum fimleikarhallunum undir einum taki í Gundadali, har rytmiskur fimleikur og amboðsfimleikur fáa javnbjóðis møguleikar.

Tá meta vit okkum eisini hava sett ein virðiligan varða yvir tað arbeiði, sum havnarfólk í eina øld hava gjørt í Havnar Fimleikafelag til tess at ”styrkja nervurnar og viljakraftina” og ”fyribyrgja bleiksjúku og alskyns hysteriska armóð”.

Hjartaliga til lukku við teimum 100 árunum og tí góða arbeiði, sum tit hava gjørt og sum tit framvegis gera. Vit síggjast aftur í Gundadali í vár.

Takk fyri.

# Hugaheimurin, ein heilsan til HF

***19. november 2009***

Størsta ítróttarfelagið í landinum Havnar Fimleikafelag rundar hetta árið tey 100. Ígjøgnum hesa øld hevur felagið ment nógvar fimleikarar, ungir sum eldri, eins og felagið eisini hevur verið ein av karmunum um tær nógvu broytingarnar, sum eru farnar fram, hvat viðvíkur fimleikinum.



Í sambandi við 100 ára haldið hjá Havnar Fimleikafelag skipar felagið, í samstarvi við Norðurlandahúsið, fyri stórari fimleikaligari framførslu tann 28. og 29. novembur.

Framførslan, ið kallast ”Hugaheimurin”, fer at vísa tann besta fimleikin felagið eigur. Fremstu kappingarfimleikararnir, bæði innan reiðskap og rútmu, fara saman við øðrum úrvalsfimleikarum at framføra eitt hav av innsløgum, sum uppá nógvar ymsikar mátar lýsa fimleikin. Við ymiskum rørslum verða ávís evni, sum okkum menniskju rúma í hugaheiminum lýst, og saman við alskyns amboðum, ljósi, ljóði og pallsmíði røkka hesi eini hægri eind og fara ivaleyst at hugtaka áskoðararnir.



Lesandi útisetarnir Eyð Strøm og Annika Abrahamsen, sum báðar búgva í Keypmannahavn, hava slitið sínar barnaskógvar í Havnar Fimleikafelag, og hava seinastu árini arbeitt nógv við kappingarliðunum hjá felagnum. Tað eru hesar báðar, sum standa á odda fyri ”Hugaheiminum”, sum er ein gáva til Havnar Fimleikafelag á stóra degnum. Tær hava arbeitt við verkætlanini síðani í summar, og hava verið fleiri vikuskifti í Føroyum hetta heystið fyri at læra og venja fimleikararnar, sum skulu framføra ”Hugaheimin”.

Framførslurnar verða leygardagin 28. novembur kl. 16.00 og 19.00 og sunnudagin 29. novembur kl. 16 í Norðurlandahúsinum. Atgongumerki á 150 krónur fyri vaksin og 75 krónur fyri børn eru at fáa til keyps á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum og í kunningarstovunum kring landið.

# Fimleik sum lívsstíl - samandráttur

***20. november 2009***

Í samband við at Havnar Fimleikafelag hátíðarheldur 100 ára stovningardagin varð skipað fyri einum sera áhugaverdum tiltakið í Müllers Pakkhúsið týskvøldið 17. november. Tiltakið hevði heitið “Fimleik sum lívsstíl”.

Tiltakið sum var alment og ókeypis, varð skipað sum fyrilestrar og kjak.

Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi, Helle Drews, fysioterapeutur, Magni Mohr, ítróttargransskari, Bergur Godtfred, lærari og Erika Hayfield, granskari umrøddu og kjakaðust um fimleik sum lívsstíl. Orðstýrari varð Óluva Zachariassen.

Sjúrður Johannesen legði fyri. Hann tók útgangsstøðið í sær sjálvum. Hann kom inn á, hvussu stóran týdning fimleikurin hevði havt fyri hann. Hann var sárbærur sum barn, men tá hann bleiv partur av Havnar Fimleikafelag, fann hann nakað sum hann dugdi og sjálvsálitið vaks. Sjúrður kom eisini inn á, hvussu týdningarmikið tað er at røkja elituna, tí at fimleikarar síggja upp til elituna og ynsktu at verða partur av henni.

Helle Drews meinti at tað var stórur tørvur á eini grundútbúgving fyri fimleika leiðarar, tí at nógv vóru ikki “klædt på til opgaven”. At gera fimleik, gevur eitt breitt fundament – bæði fysiskt, sosialt og sálarligt.

Magni Mohr segði, at fimleikarar hava stórt kropsmedvit/kropsintelligens og hava lætt við at læra aðrar ítróttargreinar. Fimleikarar eru eisini eyðkendir fyri at vera skjótsterkir og fyri at hava góða kropsjavnvág. Viðvíkjandi fimleiki í skúlunum, kom Magni inn á, at skúlin mátti hava eina ætlan við fimleikinum, sum við øllum øðrum fakum – hetta manglaði “í den grad” í dag.

Bergur Godtfred kom inn á hvussu týdningarmikið tað er at stimbra børn, m.a. tí, at tann kropsligi førleikin er við til at menna heilan. Børn sum eru fysiskt væl fyri, senda signal um, at tey hava yvirskot og eru tey tískil ikki so løtt offur fyri happing.

Erika Hayfield umrøddi fimleik og samleika. Hon lýsti samleika sum okkara fatan av hvørji vit eru og hvørji onnur eru. Sum børn forma vit samleika og sum ung verður samleikin alsamt meira stabilur. Hon meinti, at kappingarelementi var eitt virði í samfelagnum, men nevndi eisini, at kappingarítróttin kundi hava sínar vansar. Ein kanning vísti, at sjálvskenslan hjá gentum 10-13 ár, sum kappaðust í fimleiki var lægri enn hjá teimum sum ikki kappaðust.

Aftaná framløgurnar var kjak, har tað millum annað varð umrøtt, um tað er skúlans uppgáva, at hava rørsluvenjingar í skúlunum ella um tað er eitt frítíðarítriv eftir skúlatíð. Tað var breið semja um, at tað var týdningarmikið at hava rørsluvenjingar í skúlunum og at hetta avgjørt var skúlans uppgáva. Tað eru nógv børn sum ikki íðka ítrótt eftir skúlatíð og sum samfelagið er innrætta í dag, við at nógv tíð verður brúkt við teldu- og sjónvarpsskíggjar, verða hesi børnini slept uppá fjall, um tey ikki fáa rørsluvenjingar í skúlunum. Bergur segði, at hann hevði verið lærari í mong ár, og tað var hansara klára fatan, at tey sum íðka ítrótt, klára seg betur fakliga enn tey sum ikki íðka ítrótt.
Tosa var eisini um kappingarfimleikarar og anoreksia. Tey flestu meintu ikki at fimleikarar vóru meira útsett enn onnur. Havnar Fimleikafelag vísti á, at onkur fimleikari hevði havt trupulleikar við anoreksia, men at hetta kom ikki ofta fyri. Havnar Fimleikafelag hevði roynt at fyribyrgt anoreksia við m.a. at havt kostráðgeva tilknýttan tí estetiska fimleikinum.

# Heilsan til Havnar Fimleikafelag á 100 ára stovningardegnum

***24. november 2011 Katrin Joensen***

Vil fyrst takka fyri møguleikan at vera við, og vegna Ítróttasamband Føroya vil eg fegin ynskja tykkum í Havnar Fimkeikafelag hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum, felagið nú hevur á baki.

100 ár er long tíð, men í fimleiki eru hetta dýrabærar løtur, góðar upplivingar og sterk felagskensla fyri nógv menniskju.

Havnar Fimleikafelag hevur, uttan at ivast, verið snúningspunktið fyri nógvar familjur her í Havnini ígjøgnum hesi ár, og er tað enn.

Og munnu fleiri við gleði minnast aftur á dýrabærar løtur og góðar upplivingar, ið eru knýttar av sterkari felagskenslu, ja vinabond knýtt fyri lívi.

Havnar Fimleikafelag hevur eisini havt sín týdning fyri ítróttin sum heild.
Hugsa vit um rørslu í fimleiki, er fimleikur við síni javnvág tað góða grundarlagið undir allari rørslu og øllum ítrótti.

Tá vit í dag tosa nógv um rørslu og heilsu og kenna týdningin av góðari rørslu, ja so eiga tit, sum umboða fimleikin, tykkara góða leiklut.

Tit í Havnar Fimleikafelag í dag, og tey, ið undan hava gingið, eiga stóra tøkk fyri tykkara áhaldandi arbeiði og góða vilja fimleikinum til frama og allari ítrótt at gagni.

Vil so fegin eisini heilsa tykkum, at tann mátin, ið tit møta og taka ímóti limum í felagnum, um vit so koma við børnum okkara, ella vit koma sjálvi, ja so kenna vit okkum væl og verða møtt við gleði og yvirskoti. Hetta hevur alstóran týdning fyri trivnaðin og menningina hjá hvørjum einstøkum eins og felagskapinum og ger, at tit eiga góðar evnaríkar fimleikarar, ið vaksa til í felagnum.

Kenslan hjá okkum sum foreldur, tá vit bíða uttanfyri í trappuni, ella onkur gongur sær ein túr, meðan børnini venja ,er av tí slagi, ið styrkir felagskapin.

Og tá vit saman møtast til árligu framsýningarnar, ja tá kemur sterka felagskenslan rættiliga í hæddina.

Tykkara eldhugi og gleði, saman við tykkara vitan um fimleik og høgum málsetningum, er tað, ið ger at tilgongdin er vaksandi og afturvendandi.
Tykkara mentan er tykkara styrki, og tann mentan, ið her ræður er avgerandi fyri, hvat úrslitið verður.

Einki at ivast í, at uppgávan er stór og avbjóðingarnar nógvar.

Enn einaferð hjartaliga tillukku og góða eydnu í framtíðini.
Vil síðani vegna Ítrottasamband Føroya handa umboði fyri Havnar Fimleikafelag eina heilsan, vónandi kann tað verða við til at gera mun.

Takk fyri
Katrin Joensen, nevndarlimur í ÍSF

# Forkvinnurøða á 100 ára veitsluni

***21. november 2009***



Góðu gestir, landsstýriskvinna í mentamálum, borgarstjóri, forkvinnur og formenn, samskiparar, venjarar, fimleikarar, stuðlar og onnur. Vælkomin á 100 ára veitslu hjá Havnar Fimleikafelag.

Fyri 40 árum síðani skrivaði fyrrverandi formaður í Havnar Fimleikafelag, Martin Holm soleiðis:

"Mong eru feløgini, ið sovnað eru í tíðarskeiðnum 1909-1960. Havnar Fimleikafelag hevur ikki bert ant, men tað hevur sýnt slíka lívsmegi, at tað hevur kunnað fylgt við og tikið til nýtslu tann stóra framburð, hesi 60 árini hava havt við sær innan fimleik."

Uttan at eg haldi meg taka munnin ov fullan, loyvi eg mær at pástanda, at orð hansara eru minst líka nógv galdandi í dag. Fimleikurin er í framburði og Havnar Fimleikafelag er í framburði.

Fyri 100 árum síðani vóru eini 40 limir í felagnum og tá vóru bert menn í aldrinum 15-35 ár, sum allir gjørdu meira ella minnið tað sama slagi av fimleiki. Í dag eru vit útvið 1200 limir: menn, kvinnur, gentur, dreingir, ommur og abbar. Og vit eru nærum 80 ymisk lið, sum íðka motiónsfimleik, amboðsfimleik, estetiskan fimleik, hip-hop, 'Kom í form', 'Foreldur og børn', breiddarfimleik, kappingarfimleik og mangt annað. Fjølbroytni er okkara vørumerkið og øll kunnu verða við, ungur sum gamal.

Hetta er okkara styrki, men ansa vit ikki eftir, kann hetta gerast okkara veikleiki, okkara Akilles-hælur. Í fyrstu atløgu er vandin, at felagið verður so stórt, at vit gerast fremmand fyri hvørjum øðrum. Í aðru atløgu er vandin at felagið verður so fjølbroytt, at vit einki hava til felags.

Hetta er sjálvandi fyrst og fremst ábyrgdin hjá nevnd og øðrum sum leiða ella samskipa, at

syrgja fyri ikki hendir, men vit mugu minnast til, at vit øll hava eina ábyrgd fyri hesum, tí at eingin keta er sterkari enn veikasta liðið.

Á hesum hátíðardegi vil eg gjarna varpa ljós á, at grundarlagi undir hesum fantastiska ítrótti, vit kallað fimleik og grundarlagi undir hesum fantastiska felagið sum eitur Havnar Fimleikafelag, er sjálvboði arbeiði, samanhald og felags samleiki. Uttan tað megnararbeiði vit øll somul sjálvboðin hava lagt í felagslívið, var einki felag, uttan samanhald var eingin felagsskapur, og uttan felags samleika og felags stev savnaðust vit ikki øll her íkvøld fyri at hátíðarhalda 100 ára dagin hjá Havnar Fimleikafelag.

Passandi í hesum sambandi kundi vit brúkt eitt citat frá fyrrverandi forsetanum í USA, John F. Kennedy, í eini heldur broyttari útgávu: "Spyr ei hvat felag títt kann gera fyri teg, men hvat tú kanst gera fyri títt felag." – í felagsskapi skapa vit felagið, bert soleiðis ber til at lyfta fimleikin og skapa framtíðina, men tað er hjá hvørjum einstakum, hjá mær og hjá tær, at avgerðin um at lyfta í felagsskapi skal takast.

Vit hava tað lívsmegi, vit hava tað orku og vit hava fólkið ið ger, at hesin hugsunarháttur verður framdur í verki. Tí eru vit størsta felagið í Føroyum, tí hava vit eitt vælvirkandi felag, og tí, haldi eg, at vit eisini eru besta felagið í Føroyum. Tí kunnu vit øll, ung sum gomul, við røttum ryggi bera boðskapin, "eg eri HF´ari og tað eri eg stolt av".

Vit sum eru vaksin upp í felagnum, og hava gjørt fimleik nærum alt lívið, verið venjarar, nevndarlimir og mangt annað, fyri okkum snýr Havnar Fimleikafelag seg ikki bert um fimleik ella ítrótt. Fyri okkum snýr Havnar Fimleikafelag seg ikki bert um undirhald í frítíðini ella um eitt sunt og vælhildið likam. Fyri okkum snýr tað seg um livimáta og samleika. Tað snýr seg um at geva lívinum innihald og meining. Tað snýr seg um felagsskap og tað snýr seg um hin einstaka. Tað snýr seg um hvussu vit eru til, ikki bert fyri okkum sjálvi, men fyri hvørjum øðrum.

Sjálvt um Havnar Fimleikafelag er ein stórur og vælvirkandi felagsskapur, mugu vit ikki gloyma, at Havnar Fimleikafelag eisini er partur av eini størri heild, av einum størri felagsskapi, sum er samfelagið rundanum okkum. Uttan hendan felagsskapin var Havnar Fimleikafelag ikki ein so vælvirkandi og framburðssinnaður felagsskapur. Uttan hendan stóra felagsskap var hvørki stuðul ella íblástur til menning fyri felagið.

Vit hava hini fimleikafeløgini Fimleikafelagið Ljósið, Fimleikafelagið Støkk, Klaksvíkar Fimleikafelag, Tvøroyara Fimleikafelag, Fimleikafelagið Flog og nýggja fimleikafelagið í Vágunum. Tit eru okkara kappingarneytar, men av størri týdning so eru tit okkara samstarvsfelagar. Uttan tykkum var framburðurin í fimleikinum ikki tað sum hann er í dag og uttan tykkum var fimleikurin ikki ein av størstu ítróttargreinum í Føroyum. – Vit takka tykkum fyri samstarvið undanfarnu tíðini og vóna, at vit í felag kunnu halda áfram at menna fimleikin okkara millum.

Vit hava Fimleikasambandið og Ítróttarsambandið, sum skapa rammurnar fyri okkum, serliga

tá talan er um kappingar, umboðan uttanlands, men eisini tá talan er um at seta ljós á bæði úrvalsfimleik og breiddarfimleik. Uttan tað megnararbeiði í gjørt verður í FFS og ÍSF høvdu hvørki felagið ella fimleikurin fingið tann neyðuga íblástur sum er so týdningarmikil fyri at mennast. Her tosað vit um tiltøk sum landskappingar í bæði estetiskum- og amboðsfimleiki, um luttøkur til altjóða kappingum, um fimleikaskúla og um Fimleikafagnaðin.

Arbeiði sum verður gjørt í ÍSF og FFS, ítrótti at frama, hevði ikki verið gjørligt uttan stuðul frá landinum, serliga frá Mentamálaráðnum. Havnar Fimleikafelag er fegi um tann stuðul og ta uppmerksemi Mentamálaráðið vísur ítrótti í Føroyum og vónar at hetta heldur áfram.

Vit hava eisini Tórshavnar Kommunu, sum altíð hevur verið felagnum ein hollur stuðul, fíggjarliga og á annan hátt. Seinast dømi er byggingin av fimleikahøllini ‘Fimi’, sum væntandi stendur klár um ikki so langa tíð. Vegna Havnar Fimleikafelag, vil eg takka Tórshavnar Býráð fyri alt sum gjørt verður fyri fimleikin her í býnum og vóni at hetta góða samstarv fer at halda áfram komandi árini.

Seinastu árini er ein nýggjur viðleikari komin uttanífrá. Hetta er vinnulívið. Við fíggjarligum stuðli frá vinnulívinum hevur borið til hjá okkum at seta í verk nýggj menningartiltøk, sum ikki vóru gjørlig áður. Vónandi verður góða samstarvi okkara millum enn meira útbygt komandi árini, til fyrimuns fyri allar partar.

Góðu gestir, landstýriskvinna í mentamálum, borgarstjóri, forkvinnur og formenn, nevndarlimir, samskiparar, venjarar, fimleikarar, stuðlar og øll onnur. Takk fyri at tit øll eru komin her íkvøld at heiðra felag okkara. Vónandi fara vit øll at hava eitt hugnaligt og stuttligt kvøld saman. Vónandi fara komandi 100 árini at eydnast líka væl fyri fimleikin og fyri felagið sum undanfarnu 100 árini.

Eg skal enda hesa røðu við at biða øll um at reisa seg og rópa eitt trýfalda hurra fyri Havnar Fimleikafelag og fimleikin.

# Frá kropsvenjing til fjøltáttaðan fimleik

***Ummæli 10. desember 2009 Jógvan Arge***




Havnar Fimleikafelag 100 ár

Á 100 ára haldinum hjá Havnar Fimleikafelag í Ítróttarhøllini á Hálsi ummælti Jógvan Arge eftir áheitan frá felagnum hátíðarritið "Frá kropsvenjing til fjøltáttaðan fimleik".

Tað er ikki á hvørjum degi, at eitt ítróttafelag í Havn fyllir 100 ár, so eg loyvi mær at byrja við at ynskja Havnar Fimleikafelag og øllum tykkum, sum hava staðið saman um felagið, til lukku við hesum stóra degi.

Tað er heldur ikki á hvørjum degi, at eitt ítróttafelag gevur út alla sína 100 ára søgu á sjálvum 100 ára degnum, men tað sigur nógv um felagið, at tað aftrat øllum teimum átøkum, sum hava verið í seinastuni, eisini megnar at greiða frá allari sínari søgu á høgum stigi sjálvan 100 ára dagin. Til lukku við tí eisini.

Tað er ikki hvønns mans føri at lata eina 100 ára søgu úr hondum, tí 100 ár long tíð og nógv er at siga frá. Tíðirnar hava verið skiftandi. Stundum hevur nógv ferð verið á í felagnum, og stundum hevur virksemið verið í aldudølum. Men ongantíð er slitnað sundur øll hesi árini.

Tað er ikki meir enn rímiligt, at Sámal Tróndur, sum er abbasonur og uppkallaður eftir einum av teimum fyrstu fimleikarunum í Havn, hevur skrivað hesa søguna. Tað hevur neyvan gjørt tað verri, at mamma hansara Elinborg var ein av stuðlunum í Havnar Fimleikafelag í mong Harrans ár.

Og so er Sámal Tróndur bæði søgufrøðingur og landsskjalavørður. Tað eigur ikki at sláa falskar mentir í hesum høpinum.

Bókina rópar hann "Frá kropsvenjing til fjøltáttaðan fimleik", og tað er í fáum orðum tann týdningarmesti strongurin í søguni hjá Havnar Fimleikafelag. Hetta heiti sigur okkum, at her hevur verið menning innan fimleik sum heild hesi 100 árini – eisini í Havn.

Eg havi sjálvur skrivað eina aðra ítróttasøgu í Havn frá fyrra partinum av farnu øld. Tað var bókin Havnarmenn í Gundadali, um HB frá 1904 til 1954. Satt at siga, hættaði eg mær ikki at taka øll 100 árini í einum, so hesi fyrstu 50 árini komu út á 90 ára degnum og síðani avgreiddu aðrir tey seinnu 50 árini til 100 ára dagin.

Eg hevði eina journalistiska tilgongd til evnið, men brúkti eins og Sámal Tróndur gerðabøkurnar sum høvuðskeldu. Tær komu sera væl við. Skilji á hesi bókini, at høvundurnir hevur havt somu uppliving, at hann neyvan var komin so væl frá bókini, hevði Havnar Fimleikafelag ikki havt so gott skil á sínum gerðabókum. Tær eru gull verdar.

Sámal Tróndur hevur kanska eina meiri akademiska tilgongd til tilfarið. Hann hevjar seg stundum eitt sindur upp um tær dagligu hendingarnar og ger heldur burtur úr teimum størru og longru linjunum í søgugongdini hjá bæði bæði felagnum og fimleiki sum heild – men kortini leggur hann ikki tær týdningarmiklu detaljurnar í felagsins gerandisdegi burturúr. Tær eru jú klípini, sum binda søguna saman og lýsa samleikan hjá felagnum.

Tað er hvørt sítt at skriva fótbóltssøgu og at skriva fimleikasøgu. Fimleikurin hevur ikki verið kappingarítrótt á sama hátt sum fótbóltur, og tí koma ikki so nógv nøvn fyri í hesi bók sum tað koma í eini fótbóltsbók, har teir, sum skora mál og gera straffi ofta verða nevndir.

Men fimleikur hevur eisini verið og er framvegis fyri ein part kappingarítrótt, og úrslitini av øllum teimum einstaklinga og liðkappingum, sum hava verið í felagnum, eru at finna í bókini. Tað er ótrúliga gott tilfar at leita til.

Eg endurupplivi nú tað, sum eg fyrr havi fingið fortalt, at fastur mín Hanna undir krígnum vann 2. prógv í innanfelagskapping hjá kvinnum, og nú síggi eg svart upp á hvítt aftur, at Poul Ellingsgaard, Sofus við Stein og Livve Dam vóru teir kappar í fimleiki, sum eg hevði varhugan av.

Sofus við Stein vann felagskappingina tvær ferðir kring 1930. Hesin maður flutti til Danmarkar, har hann var málarameistari í Maribo. Systir hansara búði í Keypmannahavn, og var mamma tann kenda danska súkklaran Kurt við Stein, sum vann bæði olympiskt gull og heimsmeistaraskap. Ein sonur hendan Sofus var eisini frammarlaga í danskari súkling fyri 50 árum síðani.

So her eru óivað komnar nakrar knotur við úr Havnar Fimleikafelag.

Frá fimti- og sekstiárunum síggja vit allar teir kapparnar, sum stríddust um at vera besti fimleikari í Havn. Frá Lulu Djurhuus til Christian hjá Debes, um Olaf hjá Apotekaranum, Dánjal Húsgarð og Bjarna Johansen til til Jóhann Kjeld og Kaj Aage Troest og fleiri. Hesir báðir seinastu fóru út um eingjargarðarnar og løgdu lunnar undir Støkk á Glyvrum.

Vit havnardreingir, sum sóu upp til hesar báðar fjøltáttaðu ítróttamenninar, harmaðust hesa gongd, men søgan hjá Sámal Tróndi sigur okkum, at hetta var eitt heppið bragd, tí Støkk gjørdist á mangan hátt eitt gott samarbeiðsfelag og ein sterkur kappingarneyti hjá Havnar Fimleikafelag – og tað hevur ment bæði felagið.

Tað kom eisini tann tíð, tá ikki allir fimleikarar í Havn hildu seg fáa sín tørv uppfyltan í tí gamla felagnum. Tað førdi til stovnanina av Fimleikagnum Ljósinum, ið serliga kvinnur

leitaðu til. Hendan gongd verður í søguni lýst sum ein avbjóðing, ið skundaði undir Havnar Fimleikafelag at liggja betri á takinum.

Menninir, sum fingust við amboðsfimleik, vóru ikki bert kimiligir. Teir vóru eisini sterkir. Tað gav at býta einaferð, vit ferðaðust í hernaðarflogfari millum býir í Portugál. Eg sat undir liðini á gamla Føroyameistaranum Echardt Persson.

Hann var kanska nakað illa svøvntur, so hann skuldi remba sær og trýsti nevarnar upp undir takið. Reiggjurnar, sum vit sótu í, vóru bara festar í erva, og brádliga lá Echardt á dúrkinum. Hann hevði tikið so hart á, at sjálvt hesir militeru stropparnir slitnaðu úr festunum.

"Frá kropsvenjing til fjøltáttaðan fimleik" er ein áhugaverd bók og virðiligur varði yvir Havnar Fimleikafelag og tess virksemi. Hon lýsir eins og heitið sigur, at fimleikurin í dag er ikki so eintáttaður, sum hann var tey fyrstu mongu árini, men er so fjølbroyttur og up to date á summum økjum, at vit órædd kunna luttaka í altjóða kappingum.

Tá tú skalt ummæla, so plaga tey at siga, at tú skalt hava onkra kritiska viðmerking. Skal eg hava nakra longu nú á útgávudegnum, so er tað, at tað kundi kanska verið eitt sindur meir av kjøti og blóði í henni. Skilt á tann hátt, at tað hevði verið ófø rt at fingið meir at vita um allar hesar persónarnar, sum hava staðið frammarlaga í felagnum og hava staðið seg væl. Men skuldi tað eisini verið gjørt, so hevði arbeiðið verið upp aftur størri og drúgvari.

Bókin stendur samanumtikið væl. Hon lýsir felagið og ítróttagreinina á fullgóðan hátt, og tað var setningurin hjá Sámal Tróndi.

Til lukku við 100 ára bókini – Sámal Tróndur og Havnar Fimleikafelag. Hon er verd at lesa og góð at eiga hjá øllum, sum eru góð við Føroya størsta ítróttafelag – Havnar Fimleikafelag.

Jógvan Arge.



*Jógvan Arge ummælir bókina á 100 ára degnum*

# Venjingarlegan á Eiði

***10. desember 2009***



Heimasíðan hjá FFS hevði herfyri hesa áhugaverdu grein:

**Venjingarlegan á Eiði**
Ítróttarhøllin á Eiði var karmur um eina sera áhugaverda venjingarlegu 6. - 8. november 2009, tá Føroya Fimleikasamband skipaði fyri einari legu fyri 210 fimleikarum og venjarum í estetiskum fimleiki.

Feløgini sum luttóku vóru: Ljósið, Havnar Fimleikafelag, Støkk, Flog og Klaksvíkar Fimleikafelag.

**Vitjan úr Russland**
Høvuðsvenjarin hjá Roxett, Olga Ponikarova,og Svetlana Shishkina, ið er balletdansari og fyrrverandi fimleikari í Roxett, komu ta longu leið úr Russlandi til Føroyar fyri at geva okkara fimleikarum eitt innlit í tí russisku grundvenjingini innan estetiskan fimleik.
Svetlana undirvísir í ballet hjá Roxett, og hon undirvísti okkara fimleikarum í klassiskari ballet, yoga og seriusamanseting.
Olga Ponikarova stóð fyri tí fysisku grundvenjingini, millum annað upphiting, smidleikavenjing, fótarbeiði og styrki. Eisini fingu fimleikararnir góða undirvísing í grundvenjing í balansum, piruettum og lopum.
Við sær hevdi Olga eisini dóttrina Anastasia Ponikarova, sum er eitt supertalent. Anastasia vísti øll øvilsini, og hjálpti til við undirvísingini.

Fimleikararnir vóru hugtiknir av 12 ára gomlu Anastasiu, hon var ótrúliga smidlig og væl fyri í øllum krøvum, so sum kropsbylgjum, lop og balansum. Allir okkara íðkarar góvu seg 100 % fyri at royna at eftirlíkna hennara rørslum. Venjarar og ábyrgdarar høvdu úr at gera við at taka myndir og fáa alt upp á band. Serliga styrkin og smidleika venjingarnar hjá Olgu vóru sera vælumtóktar, tí nógv ymisk øvilsir vóru samansett til eina seriu, har genturnar vandu

styrki og smidleika samstundis. Alt var so gott lagt til rættis hjá teimum, tað var hugsað um hvørja detalju, sjálvt eitt sindur av kondition var lagt í smidleika venjingarnar.
Til hvørja legu hitaðu fimleikararnir upp saman og høvdu felagsvenjing, umframt at tær vóru býttar upp í tríggjar bólkar, so mest gjørligt kundi fáast burturúr.

Tað var áhugavert at síggja íðkarar frá øllum feløgunum venja saman, tá tær til dagligt venja fram til tvær steypakappingar og FM, sum hvørt felag strembar eftir at vinna. Tað var sjónligt, at Føroyar høvdu fingið eitt ótrúliga gott landslið, um tær bestu frá hvørjum felag vóru á sama liði. Vit kunnu gott vera stolt av okkara kappingarliðum í øllum aldursbólkum, tær arbeiða hart fyri at taka seg fram og eru sera dugnaligar.

Legan byrjaði fríggjakvøldið fyri smágentum í aldrinum 10-12 ár og gentum 12-14 ár. Leygardagin var undirvísing fyri unglingum og kvinnum, og hvør bólkur, ið vandi í tveir dagar, yvirnáttaði eina nátt. Tá tað var gjørt upp, høvdu Olga og Svetlana undirvíst í alt 24 tímar.
Til allar hesar venjingar var eisini góður matur til fimleikararnar, sum sjálv samskiparin í FFS saman við góðari kokkakonu syrgdu fyri. Hetta kom væl við aftan á harða venjing.
Hvør lega endaði við einari seriu, har Olga gav hvørjum liði ymisk krøv, sum liðini skuldu seta saman til eina seriu, t.d. skuldi eitt lið seta eina bylgju, eitt sving og eina balansu seriu saman. Hetta skuldi so framførast til eitt ókent tónleikabrot, sum Olga hevði valt frammanundan. Tað var eitt satt upplivilsi at síggja, hvussu liðini brúktu tað tær høvdu lært frá leguni, og at síggja hvussu ymiskan framførslu stíl hvørt felag hevði. At feløgini hava so ymiskan stíl, gevur altíð spenning og undirhald til kappingarnar, sum FFS gleðir seg til at fyriskipa komandi ár.

Føroya Fimleikasamband nýtir felagsskapin IFAGG, at kunna seg um skeiðleiðarar. IFAGG er vitandi um okkara tørv, so vit kunnu fáa teir best passandi skeiðleiðarar hendan vegin. Tað er av sera stórum týdningi, at skeiðið er lagt til rættis soleiðis, at tað samsvarar við støði, sum okkara fimleikarar eru á, so allir fimleikararnir fáa notið gott av skeiðinum.

Skeiðleiðararnir vóru sera ovfarnir at úrslitinum. Vit hava nógvar sera góðar fimleikarar, og um okkara venjarar nýta sama leist, tá teir venja, so síggja vit enn betur úrslit um nøkur fá ár. Hetta er ikki seinastu ferð Fimleikasambandið fær vitjan av hesum skeiðleiðarum, tær eru sera áhugaðar í at koma aftur næsta ár. Karmarnir á Eiði vóru heilt fantastiskir, ein sera væl viðfarin, ljós og stór høll, sum hevði allar hentleikar. Fimleikasambandið hevur nú eftir hesa venjing gjørt avtalu við Hotel Eiði, sum eisini kann gera sítt til, at legurnar kunnu gerast enn betri, um gist verður har.

**Citat:**

*"Eg haldi at legan var spennandi, eg lærdi nógv, men legan var eitt sindur strævin, vit gjørdu nógvan smidleika og styrki. Og so til kokkarnar, maturin smakkaði rættiliga væl. :)"* Eydna Maria Debes, Gentur A, Havnar Fimleikafelag

*”Genturnar hildu, at tað var ótrúliga strævið, men dámdu tað ótrúliga væl. Eg sum venjari og íðkari helt, at tað var heilt fantastiskt! Tað skuldi verði gjørt minst einaferd um mánaðin,*

*man fær so nógv burturúr, tá man sær, hvat man hevur at stremba eftir… og tað var super, at øll feløgini vóru saman, tað gevur gott samanhald ímillum okkum allar."* Katrin Frederiksberg, kvinna og venjari hjá Gentum A, Støkk

*" Legan var fín og deiliga gevandi, og vónandi verður ein slík lega aftur. Bæði fyri at fáa feløgini meira saman og at fáa nýggjan íblástur. Tað er gott at síggja, at feløgini kunnu vera saman um nakrar venjingar…"* Ása Beder, venjari, Flog

*"Mær dámdi væl leguna á Eiði. Hon var væl fyriskipað, her hugsi eg um umstøðurnar at venja í, matin, soving o.s.v . - At fáa professionel uttaní frá at læra okkum, haldi eg er gott fyri okkum øll, sera mennandi, bæði fyri fimleikarar og venjarar….*
*Mær dámdi best, at tær høvdu Anastasiu við, sum er nøkunlunda javngomul við genturnar. Hetta hevði við sær, at genturnar sóu, at man virkuliga kann, hóast man er ungur, og at tær hava nógv at venja upp ímóti…Kanska legan bleiv í so drúgv fyri genturnar. Tað vóru fáar fríløtur, har genturnar kundu hugna sær og "ikki hugsa um fimleik"... tað var eitt sindur strævið fyri tær!"* Jónvá Joensen, venjari hjá smágentum, Klaksvíkar Fimleikafelag

*"Tað er altíð spennandi at síggja, hvussu venjarar uttanlands arbeiða fyri at fáa genturnar á so høgt støði sum møguligt, og tað er uppaftur meira spennandi, tá venjararnir so koma frá Roxett og hava ótrúliga nógva erfaring! Tað er stuttligt at fáa uppfrískað vitan/rørslur/venjingarhættir o.s.fr. fyri síðani at arbeiða víðari við tí í tí dagliga. Tað hevur heilt sikkurt verið stuttligt og nýtt fyri íðkararnar at vera á venjingarlegu saman við hinum feløgunum, og hetta eru vit glað fyri. Tað er altíð gott at fáa nýggjar upplivingar og nýtt input frá Fimleikasambandinum :)"* Hildigunn Anfinnsdóttir Norðfoss, venjari hjá kvinnum, Ljósið

FFS 08.11.2009